STUTT SAGT

## Vita ov lítið um holocaust

Dansk Institut for Internationale Studier heldur, at danskir skúlanæmingar læra ov lítið um jødatýningina og kreppuna í Miðeystri, og at tað kann elva til veksandi jødahatur.

Í einari nýggjari frágreiðing skrivar stovnurin millum annað, at tað finnast dømi um, at muslimskir næmingar í Danmark skræða myndirnat av tí ísraelska flagginum úr landalærubókunum. Stovnurin mælir tí myndugleikunum til at geva næmingunum betri kunnleika til jødatýningina, tí nú eru so mong ár liðin síðani seinna heimsbardaga, at tey ungu duga ikki rættiliga at seta seg inn í tað, sum tá hendi jødunum.

Rikke Hvilshøj, sum er ráðharri í innflytaramálum, tekur undir við tilmælinum. Hon sigur, at jødatýningin var so ræðandi, at øll eiga at kenna hana og taka við lærtu av tí, sum hendi.

## Offur krevja endurgjald

Tey, sum sluppu livandi frá tilburðinum, tá flogvápnið hjá Saddam Hussein bumbaði býin Halabja við eiturbumbum í 1988, vilja nú hava endurgjald frá teimum fyritøkunum, sum seldu fyrrverandi irakska einræðisharranum eiturgass.

Kamil Abdel Qader, sum er talsmaður hjá teimum, sum sluppu livandi frá álopinum, sigur við AP, at lond, sum stýðjaðu táverandi stýrið í Irak, skulu eisini dragast til svars. Tað snýr seg millum annað um USA, sum seldi Irak tyrlur og aðra hernaðarútgerð til kríggið við Iran, og Bretland, Frakland og fleiri fyrrverandi sovjetsk lýðveldi verða ætlandi eisini drigin fyri rættin.

Eiturálopið á Halabja kostaði umleið 5.000 mannalív, og tær skelkandi myndirnar av deyðum mammum og børnum skakaðu heimin. Bara nøkur fá hundrað fólk sluppu frá álopinum á lívi.

## Norðmenn stúra fyri yvirgangi

Fyri einum ári síðani vísti ein kanning, at sjey prosent av norska fólkinum stúrdu fyri, at yvirgangsmenn fóru at søkja at málum í Noregi. Nú vísir ein nýggj kanning, at í dag eru tað 17 prosent, sum ganga við tí óttanum. Tað vil siga, at umleið ein hálv millión norðmenn ganga og stúra fyri yvirgangi, skrivar Aftenposten.

Karl Ove Aarbu, sum hevur verið við til at gera kanningina, sigur við blaðið, at nógvir norðmenn lótu seg ávirka av tilburðunum, tá illir muslimar settu eld á norskar sendistovur og norska flaggið undir rokinum um Muhammedstekningarnar.

Eitt annað, sum eisini hevur ávirkað mong, er, at yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda fyri stuttum hótti við atsóknum at Noregi.

Tann nýggja kanningin vísir, at tað eru serliga tær norsku kvinnurnar, sum stúra fyri yvirgangi, og at tað eru tey 18 til 24 ára gomlu, sum hugsa mest um tað.

## Ein kvinna skal taka við

Í gjár kunngjørdi stjórin í skandinaviska flogfelagnum SAS, Jørgen Lindegaard, at hann fer frá í heyst, og longu nú eru fólk farin at tosa um, hvør skal taka við eftir hann.

Nevndin í SAS hevur sagt, at hon hevur ikki tikið støðu til, hvør skal í stjórastarvið, men hon fær ikki trupult við at leita eftir uppskotum. Í hvussu er hava tey norsku starvsfólkini hjá SAS skotið upp at seta svensku Marie Ehrling í starvið. Hon var varastjóri í SAS, men segði seg úr starvinum fyri fýra árum síðani. Síðani hevur hon verið stjóri í samskiftisfyritøkuni TeliaSonera.

Norskir fjølmiðlar vilja vera við, at norski varastjórin í SAS, Gunnar Reitan, er millum teirra, sum kunnu koma upp á tal, tá nevndin skal seta eftirmannin hjá Jørgen Lindegaard.

UTTAN ÚR HEIMI

# Leyg fyri at fáa ríkisborgararætt

**Niðurlendska Ayan Hirsi er ikki niðurlendsk longur, eftir at hon hevur viðgingið, at hon segði ósatt fyri at fáa ríkisborgararætt í Niðurlondum**



*Ayan Hirsi*

NIÐURLOND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Á einum tíðindafundi í gjár noyddist Ayan Hirsi at viðganga, at hon hevði givið niðurlendsku myndugleikunum skeivar upplýsingar, tá hon fekk ríkisborgararætt í 1992. Eitt nú hevði hon falsað navnið og aldurin, og hon hevði heldur ikki sagt, at hon hevði verið í Týsklandi á vegnum. Sostatt var hon vorðin niðurlendskur ríkisborgari undir skeivum fortreytum, og stjórnin í Haag hevur eisini boðað henni frá, at hon missir ríkisborgararættin alt fyri eitt.

Við hesum endar ein av teimum mest merkisverdu søgunum í niðurlendskum politikki. Tað er søgan um flóttafólkagentuna, sum kvettið sambandið við sín muslimska uppruna, og sum gjørdist ein av teimum fremstu í Evropa at finnast at Islam. Í Niðurlondum gjørdist hon so nógv avhildin, at hon bleiv vald í tjóðartingið, og tað var hon, sum skrivaði handritið til tann víðagitna filmin hjá Theo Van Gogh, sum seinni kostaði honum lívið. Tey seinastu árini hevur Ayan Hirsi eisini livað við støðugum hóttanum, og hon hevur alla tíðina havt lívverjar hjá sær.

Men fyri nøkrum døgum síðani avdúkaði ein sjónvarpssending, at tann nú 36 ára gamla Ayan Hirsi átti ikki at fáa niðurlendskan ríkisborgararætt, tá hon kom hagar í 1992. Tvørturímóti áttu myndugleikarnir at sent hana av landinum. Tað gera teir so nú, og Ayan Hirsi segði í gjár, at hon ætlar sær at flyta til USA.

# Sellafield letur uppaftur

**Ein leki noyddi bretar at lata kjarnorkuendurvinningarvirkið í Sellafield aftur í fjør. Nú verður tað latið uppaftur**

DÁLKING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Eg haldi tað vera sera harmiligt, at virkið verður latið uppaftur, og eg havi eisini sagt bretsku myndugleikunum tað, sigur norski umhvørvismálaráðharrin, Helen Bjørnøy, við Aftenposten, eftir at tað er komið fram, at bretar ætla at lata tað umstrídda virkið uppaftur.

Í fjør noyddust bretar at steingja virkið orsakað av leka, og kanningarnar tá avdúkaðu, at geiðslavirki evni var runnið frá virkinum í átta mánaðir, uttan at nakar hevði varnast tað. Sambært kanningunum vóru 80 tons av geiðslavirknum evni runnin út í Írska Havið, áðrenn virkið bleiv latið aftur.

Norsku myndugleikarnir hava í fleiri ár biðið bretar lata virkið aftur, tí dálking haðani kann reka við havstreyminum ímóti norsku vesturstrondini.

# Vandamestu fangarnir ikki á listanum

Tá amerikonsku myndugleikarnir herfyri almannakunngjørdu nøvnini á fangunum á støðini í Guantanamo, restaðu nøkur nøvn í, skrivar AP. Sambært tíðindastovuni er talan um nakrar fangar, ið verða roknaðir sum teir vandamestu, og tað hevur fingið fólk at gita, at teir helst verða fjaldir onkra aðrastaðni.

Av teimum 759 nøvnunum á listanum eru umleið 200, sum ongantíð hava verið nevndir fyrr. Umleið 190 av fangunum eru úr Afghanistan og 131 úr Saudiarabia. Teir flestu eru ímillum 25 og 34 ár, men tríggir eru yngri enn 18 ár, skrivar AP.